# Veðrið



**Fimmdagaforsøgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag.**
Lot av vestri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men eisini mjørkaflókar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot av ymsum ættum, seinni av landsynningi. Turt og sólglottar, men eisini mjørki í støðum.Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot av landsynningi, turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eystri Turt og sólglottar, men eisini mjørki.í støðum. Hitin millum 8 og 11 stig, men vestanfyri upp í 15 stig.



# Sjónvarpið fær meira pengar

*Fíggjarnevndin mælir løgtinginum til at játta SvF 2,4 milliónir krónur fyri rakstrarhall tvey tey seinastu árini*

Eyðun Klakstein

Sjónvarp Føroya fær nú eina eykajáttan upp á 2,4 milliónir krónur frá løgtinginum.

Ein samd fíggjarnevnd tekur undir við uppskotinum um at lata Sjónvarpið fáa hesar pengar fyri rakstrarhall tvey tey seinastu árini, og fíggjarnevndin mælir løgtinginum til at samtykkja eykajáttanarlógina.

Fíggjarnevndin treytar sær tó, at landsstýrismaðurin í mentamálum finnur eina endaliga loysn á fíggjarligu trupulleikunum hjá almenna sjónvarpinum.

Landsstýrismaðurin hevur fingið frágreiðingar frá fyrisitingini í Undirvísingar- og mentamálastýrinum og sjónvarpsstjóranum um fíggjarligu trupulleikarnar.

Ein av komandi døgunum fær Høgni Hoydal, sum er landsstýrismaður á økinum – fyribils – ein grannskoðaðan roknskap frá einum uttanhýsis grannskoðara. Saman við hesum roknskapi fylgir eisini ein grannskoðarafrágreiðing.

So skjótt sum landsstýrismaðurin hevur fingið roknskapin og frágreiðingina, fer hann at gera eina atgerðarætlan fyri Sjónvarpið, so trupulleikin við vantandi pengum ikki verður afturvendandi.

Signar á Brúnni mátti frá sum landsstýrismaður, eftir at hann hevði latið Sjónvarpinum pengar av gjaldføri landskassans. Men hesa ferð er líkt til, at pengarnir, sum Sjónvarpinum vantar, verða latnir eftir eina samtykt í løgtinginum.




Kuldabrúgvin við Føroyar hvørvur eystureftir og hátrýstið sunnanfyri Ísland kemur móti Føroyum.




Hátrýstið við Føroyar mennist og gevur góðveður komandi dagarnar á okkara leiðum.




**Hitalagið mált frá 08./05. kl 06⁰⁰–09./05. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,5°C**
Minsti hiti máldur í mai: **÷3,0°** Mesti hiti máldur í mai: **19,7°**




Avfallið: 0,1 mm – **mált frá 08./05. kl 6⁰⁰–09./05. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í mai: 0,7 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷3 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 16 |
| Tromsø | 4 |
| Bergen | 19 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannahavn | 19 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 11 |
| Berlin | 24 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 13 |
| Róm | – |
| Malorca | 22 |
| Athen | 25 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 12 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 19 |
| New York | 31 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 26 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |



## TIPS 13 úrslit
**Vika 18**
**6.–8. mai**

| | |
|---|---|
| 1. Arsenal–Chelsea | 1 |
| 2. Coventry–Sheffield W. | 1 |
| 3. Derby–Newcastle | X |
| 4. Leicester–Bradford | 1 |
| 5. Middlesbrough–Watford | X |
| 6. Sunderland–West Ham | 1 |
| 7. Wimbledon–Aston Villa | X |
| 8. Celtic–Aberdeen | 1 |
| 9. Dundee FC–Dundee U. | 1 |
| 10. Hearts–St. Johnstone | X |
| 11. Motherwell–Hibernian | 1 |
| 12. Werd. Brem.–Bay. Münch. | 2 |
| 13. Sporting Lissabon–Benfica | 2 |

**Prognosa**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | 222.948,- kr. |
| 12 røtt: | 2.231,- kr. |
| 11 røtt: | 191,- kr. |
| 10 røtt: | 36,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum




**Vika 18 – 6. mai**

Vinnaratøl: **09 - 14 - 18 - 20 - 23 - 25 - 31**
Eykatøl: **19 - 29**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | 1.068.803 |
| 6 vinnarat.+1 eykat.: | 70.228,- kr. |
| 6 vinnaratøl: | 4.271,- kr. |
| 5 vinnaratøl: | 158,- kr. |
| 4 vinnaratøl: | 36,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



**Vika 18 – 6. mai**

Jokaratal: **5-9-2-8-6-5-2**

| | |
|---|---|
| 7 røtt: | Eingin vinnari |
| 6 aftastu røtt: | Eingin vinnari |
| 5 aftastu røtt: | 60.080,- kr. |
| 4 aftastu røtt: | 8.474- kr. |
| 3 aftastu røtt: | 597,- kr. |
| 2 aftastu røtt: | 131,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**DUSINO**

**Vika 18 – 7. mai**

Vinnaratøl: **01 - 02 - 03 - 06 - 07 - 08 - 11 - 12 - 16 - 17 - 18 - 22**

| | |
|---|---|
| 12 í sama punti: | Eingin vinnari |
| 11 í sama punti: | 2.397,- kr. |
| 10 í sama punti: | 110,- kr. |
| 9 í sama punti: | 26,- kr. |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

sosialurin
www.sosialurin.fo

## Vestfalskyrrindi

6. mai: Mánin næstur jørðini
10. mai: Fyrra kvarter

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmannasundi fp | sp | Mykinesfirði fp | sp | Nólsoyarfirði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvannasundi fp | sp | Fugloyarfirði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. mai | — | 12.07 | 11.07 | 23.43 | 11.22 | 23.58 | 1.32 | 14.07 | 2.32 | 15.07 | 10.22 | 22.58 | 9.22 | 21.58 | — | 12.22 | 0.47 | 13.22 | 11.52 | — | 0.32 | 13.07 |
| 11. mai | 0.43 | 13.24 | — | 12.24 | — | 12.39 | 2.43 | 15.24 | 3.43 | 16.24 | 11.39 | — | 10.39 | 23.21 | 0.58 | 13.39 | 1.58 | 14.39 | 0.28 | 13.09 | 1.43 | 14.24 |
| 12. mai | 2.06 | 14.47 | 1.06 | 13.47 | 1.21 | 14.02 | 4.06 | 16.47 | 5.06 | 17.47 | 0.21 | 13.02 | — | 12.02 | 2.21 | 15.02 | 3.21 | 16.02 | 1.51 | 14.32 | 3.06 | 15.47 |
| 13. mai | 3.29 | 16.03 | 2.29 | 15.03 | 2.44 | 15.18 | 5.29 | 18.03 | 6.29 | 19.03 | 1.44 | 14.18 | 0.44 | 13.18 | 3.44 | 16.18 | 4.44 | 17.18 | 3.14 | 15.48 | 4.29 | 17.03 |

Kelda: Skipalistin 2000